## Frem vann aftur

Tað eydnaðist aftur í gjár hjá Frem at fáa ein sigur til høldar. Frem tók ímóti Hvidovre á Valby Idrætspark. Dysturin endaði 2-1 til Frem. Støðan í hálvleikinum var 0-0. Ikki fyrr enn 70 minuttir vóru spældir kom hol á. Søren Weibel legði tá Frem á odda. Góðar 10 minuttir seinni økti Patrizk Wozniacki, sum er bróðir tennisúrmælingin, Caroline Wozniacki til 2-0. Jonas Kallehauge fekk spenning í aftur, tá hann minkaði um munin til 2-1 í 85. minutti. Men Frem koyrdi sigurin heim, og eru Jón Rói Jacobsen, Atli Danielsen og liðfelagarnir nú komnir uppá 8 stig í næstbestu donsku deildini, og sær alt bjartari út nú hjá Valby-liðnum. Frem er í skrivandi stund nr. 11 av teimum 16 liðunum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini.



Kyndil-StÍF 19-19 (11-10):

# Fyrsta stigið



*Verjuparturin tykist nú rigga hjá Kyndli, sum við sínum fyrsta stigi kom á talvuna leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kyndil vann sítt fyrsta stig hetta kappingarárið, tá teir spældu javnt móti StÍF**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast Kyndil hevur havt eina sera laka byrjan upp á kappingarárið, so hava tekin verið um batar í spælinum. Eitt nú riggaði verjan heilt væl, tá Kyndil spældi móti VÍF seinasta vikuskiftið, og verjan var aftur snúningspunktið, nú fyrsta stigið kom til høldar.

Móti StÍF var Høgni Klein eisini partur av liðnum hjá Kyndli, og tað er eingin ivi um, at hann er góður styrkur at fáa.

Leygardagin var tó leingi líkt til, at StÍF skuldi taka sær av øllum, men seinastu løtuna undan steðginum fekk Kyndil gongd á. Og hóast strandingar royndu at leypa avstað, tá seinni hálvleikur byrjaði, so eydnaðist hetta ikki av álvara.

Royndirnar hjá teimum grønu eru eisini hampuliga nógvar, og tí megnaði liðið eisini at halda høvdinum kalt, tá stig skuldui fáast til høldar móti dystarenda.

Hjá strandingum var talan hinvegin um dýran miss, nú teir saman við Neistanum og H71 kapprenna um at halda fast í oddafiskunum úr Vestmanna.

**FAKTA um dystin**

**Kyndil-StÍF 19-19 (11-10)**
10 min: 2-5
20 min: 5-7
40 min: 13-14
50 min: 16-17
**Málskjúttar**
**Kyndil**: Janus Einar Sørensen 6, Høgni Klein 4, Hans Áki Dal-Christiansen 3(2), Andrias Sólsker 3, Jónleif Sólsker 2(2), Tummas Pauli Hanusarson 1
**StÍF**: Rúni Johansen 5, Alexandur Johansen 4, Bárður Danielsen 2, Hávardur Trúgvason 2, Leivur Justinussen 1, Mortan Hansen 1, Borgar Danielsen 1
**Brotskøst**: Kyndil 6
**Útvísingar**: Kyndil 1, StÍF 2
**Dómarar**: Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

VÍF-KÍF 25-22 (11-8):

# Flúgvandi vestmenningar

**VÍF heldur framveigs beina kós í oddinum. Sunnudagin megnaði KÍF ikki at skapa tann stóra spenningin**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir fyrstu fýra umførini halda vestmenningar púrasta fast um oddasessin í føroyskum manshondbólti.

Sunnudagin høvdu teir vitjan av KÍF, og ikki óvæntað gjørdist talan um ein hampuliga tryggan heimasigur.

Frá byrjan vóru tað vertirnir, sum høvdu betra takið, men um miðjan fyrra hálvleik kom veruliga stígur í. KÍF minkaði munin niður í tvey mkál, og tó at VÍF økti aftur fyri steðgin, so tóktist talan vera um ein kanska heilt javnan dyst.

Men hetta broyttist tó fullkomuliga eftir steðgin. VÍF setti seg tungt á tað mesta, og eftir fáum minuttum høvdu teir økt munin upp í sjey mál.

So var tað mesta avgjørt, og hóast kollfirðingar aftur pyntaðu um móti dystarenda, so gjørdist tað ikki í nær námind serliga spennandi.

**FAKTA um dystin**

**VÍF-KÍF 25-22 (11-8)**
10 min: 5-1
20 min: 8-6
40 min: 19-12
50 min: 21-15
**Málskjúttar**
**VÍF**: Agnar Joensen 9(2), Sámal Joensen 7, Niels Andreasen 4, John Zachariassen 2, Rúni Joensen 2(2), Áki G. Olsen 1
**KÍF**: Damir Oros 4(1), Rógvi Weihe 3, Niklas Reginsson 3, Ási Dam 3(3), Regin Petersen 2, Ingi Johannesen 2, Teitur Joensen 2, Tony Weihe 2, Andreas Nielsen 1
**Brotskøst**: VÍF 5, KÍF 6
**Útvísingar**: VÍF 6, KÍF 6
**Diskvalifikatión**: KÍF 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar**: Kristian Joensen & Karstin Joensen


